# Skrivari til Hvalbiar kommunu

Hvalbiar kommuna søkir eftir skrivara at byrja sum skjótast ella í seinasta lagi 1 .juli 2009. Talan er um eitt fulltiðarstarv.

**Starvið**
Tann,ið settur verður, skal m.a.taka sær av
- øllum vanligum uppgávum hjá kommununi
- luttaka á bygdaráðsfundum
- postavgreiðslu og
- journalisering

**Umsøkjarin**
Umsøkjarin skal
- kunna arbeiða sjálvstøðugt
- hava góð samstarvsevni
- hava telduførleika
- hava kunnleika til fíggjarstýring og fyrisitingarrætt

Lønin verður ásett eftir nærri avtalu

**Umsóknin**
Umsókn við upplýsingum um royndir og útbúgving skal sendast til Advokatvirkið, Postsmoga 85, 110 Tórshavn.

Umsóknin skal verða undirritaða í hendi í seinasta lagi 20. mai 2009.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Hans Trygva Teirin, adv. tlf. 533359.

Advokatvirkið
Skansavegur 1 • Postsmoga 85 • FO-110 Tórshavn
Tlf. 312171 • Fax 315874 • jus@olivant.fo
www.advokatvirkid.fo

# RUDDING

Tey, sum hava órudd og ognarlutir (lutir, útgerð, akfør uttan nummarplátur o.l.) á almennum øki (kommunalum øki og havnarøki), verða biðin um at beina hetta burtur í seinasta lagi 9. mai 2009.

Verður hetta ikki gjørt, verður órudd beint burtur og ognarlutir tiknir í varðveitslu og burturbeindir 14 dagar aftaná fyri eigarans rokning, um eigari ikki frammanundan hevur gjørt vart við seg.

Eru ivamál, kunnu upplýsingar fáast við at venda sær til Havnarskrivstovuna, tlf. 770120, ella teknisku deild, tlf 770105.

**Vestmanna Kommuna**

**og**

**Vestmannahavnar Havn**

# Arbeiðsfólk

Søkt verður eftir einum arbeiðsfólki til m.a
- sóping av vegum, gøtum og kommunalum økjum
- tøming av vegbrunnunum og vatnfangum
- upptøku av leysgangandi djórum (hundum, flogfenaði o.l.)
- ganga umsjónarmonnunum til handa

Arbeiðsfólkið kemur fyribils í høvuðsheitinum at arbeiða hjá kommunala umsjónarmanninum, men skal eisini í stóran mun kunna arbeiða sjálvstøðugt.

Lønin verður sambært sáttmála ímillum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og Føroya Arbeiðarafelag.

Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til teknisku deild, tlf. 770105.

Skrivlig umsókn skal verða Vestmanna Kommunu í hendi í seinasta lagi tann 18. mai 2009, kl. 12[00].

Vestmanna Kommuna skilar sær rætt til at velja ímillum innkomnu umsóknirnar ella ongan at seta.

**Vestmanna Kommuna**
**Bakkavegur 16**
**Postboks 91**
**355 Vestmanna**

FØROYA LANDFÚTI
POLITIMEISTARIN
Yviri við Strond 17 · Postboks 3018 · 110 Tórshavn

# SKRIVSTOVUNÆMINGUR

Hjá politinum í Tórshavn er eitt læruplass í skrivstovuyrkinum – almenn fyrisiting – leyst at søkja til setan 1. juni 2009.

Umsøkjarar mugu hava staðið fráfaringarroynd fólkaskúlans og FHS-, HH-, Students- ella HF-prógv.

Lærutíðin verður fastløgd alt eftir, hvat prógv næmingurin hevur frammanundan.

Í lærutíðini skal næmingurin til Danmarkar á handilsskúla í 15 vikur tilsamans.

Løn verður veitt eftir sáttmála millum fíggjarmálaráðið og HK-felagið.

Umsókn, prógv og og møgulig viðmæli verða at senda Landfútanum, Yviri við Strond 17, Postboks 3018, 110 Tórshavn í seinasta lagi 7. mai 2009.

**FØROYA LANDFÚTI**

***tann 17. apríl 2009***
***Karen Marie Olesen***

# Skúlin á Trøðni

Frælsið 32 • Postrúm 2036 • 165 Argir
Telefon 314522 • Fax 310196

# Størv til komandi skúlaár

**1 lærarastarv,** tíðarmarkað til komandi skúlaár.
*Løn og treytir sambært sáttmála hjá Føroya Lærarafelag.*

**2 pedagogstørv,** tíðarmarkað til komandi skúlaár.
*Løn og treytir sambært sáttmála hjá Føroya Pedagogfelag.*

**1 starv sum hjálparfólk,** tíðarmarkað til komandi skúlaár.
*Løn og treytir sambært sáttmála hjá Føroya Pedagogfelag.*

**1 starv sum fysioterapeutur,** tíðarmarkað til komandi skúlaár.
*Løn og treytir sambært sáttmála hjá Fysioterapeutfelag Føroya*

**Vit vænta tú hevur**
- Útbúgving/royndir
- Góð samstarvsevni
- Førleika at arbeiða sjálvstøðugt og við hugflogi eftir støði barnanna

Umsóknir skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi mánadagin 18. mai 2009

Meira fæst at vita um størvini við at ringja til skúlastjóran, Jan Christiansen, tlf. 314522 ella 280025

Skúlin á Trøðni er serskúli, ið tekur sær av børnum við serligum tørvi. Í skúlanum eru áleið 45 næmingar, har 12 børn kunnu búgva á næmingaheiminum. Skúlin á Trøðni hevur eina játtan á 14 mió.kr., og hevur um 35 fólk í starvi.

# Bilur til sølu



Nissan Almera 2,2 Diesel
frá januar 2002

**Ring 284444**

Sosialurin
www.sosialurin.fo